ítróttur

Nr. 152 • leygardagur • 13. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Máttu vera agressivir

**Dagsins B36'ari ivaðist ikki í, at mótstøðan var eina tonn sterkari, og tí var bara eitt at gera hjá B36. Nevnliga at geva alt - hvørja ferð**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

**Herning:** í einum framúr liðavriki, var tað fram um hinar Ingi Højsted, sum sýndi vegin fyri B36. Við knallhørðum tacklingum og kvikum samanspælið var hann við í tí mesta av tí, sum B36 megnaði at skapa, og við málinum til 2-1 eftir 79 minuttum var tað eisini hann, sum helt lív í vónini hjá B36 um at vinna seg enn eitt fet víðari í Europa.

At Henrik Larsen so eisini taldist millum áskoðararnar í Herning, mundi ikki gera støðuna verri hjá Inga, nú Fróði Benjaminsen er leikbannaður til komandi landsliðsuppgávuna.

Tí er heldur einki at siga til, at lagið var í toppi, tá vit eftir dystin fingu orðið á Inga, og bóðu hann siga frá, hvussu málið kom.

- Eg veit ikki rættiliga, men eg haldi tað var Alex, sum spældi bóltin fram í vinstru. Umvegis Boga kom hann so til Allan, og eg royndi so bara at rópa og renna. Allan hugdi slettis ikki upp, men spældi bara bóltin frameftir, og so var eg púra leysur og kundi knalla til, staðfestir hann.

Málið var krúnan á verkinum, men hóast fegin, so ásannaði Ingi eisini, at talan hevði verið um ein sera harðan dyst. Ikki minst á miðvøllinum, har talan var um nógvar nærdystir.

- Teir spæla øgiliga skjótt, og tá vøllurin so eisini var vátur, so økti tað um teirra fyrimun. Teir spældu skjótari og teir vóru sterkari, so vit máttu bara geva alt. Tú sást jú teirra styrki í luftbóltunum, so vit máttu bara vera agressivir. Annað var ikki at gera, helt Ingi.

### Hvør veit

Hóast hann soleiðis uttan stórvegis himpr staðfesti, at mótstøðumenninir vóru betri, so dylir Ingi ikki fyri, at úrslitið í Herning gevur B36 ein lítlan møguleika at koma víðari í kappingini.

- Tað er sjálvandi tað. Kjansurin er har, so kanska vit vinna 1-0 í Føroyum. Hvør veit!



*Við málinum til 2-1 setti Ingi Højsted krúnuna á eitt framúrskarandi avrik. Og samstundis syrgdi hann fyri, at B36 enn má sigast at hava møguleikan at koma víðari í UEFA-Cup kappingini*

# KÍ aftur í ódnarveðri

**KÍ kvinnurnar taptu hósdagin 4-1, og tá ið tær eisini mistu besta spælaran, sum tískil er leikbannaður í dag, kundu fyritreytirnar havt verið betri undan síðstu avbjóðingini**

UEFA CUP KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Tað royndist ikki, sum tað var vónað, tá ið KÍ kvinnurnar í nógvum hita seinnapartin hósdagin vóru í næstu UEFA Cup royndini í Makedona. Mótstøðuliðið var Codru úr Moldova, sum vann 4-1, eftir at tær í steðginum høvdu verið á odda 3-1.

KÍ minkaði um munin til 2-1. Málskjútti var Malena Josephsen, sum stútaði bóltin upp um málverjan og í málið. Codru økti til 3-1 undan steðginum, og fimm minuttir eftir steðgin skoraðu tær til 4-1.

Í dag skal KÍ spæla síðsta dystin. Hann verður móti ZFK Shkiponjat úr Makedonia. Fyritreytirnar hjá KÍ kundu havt verið betri undan tí uppgerðini. Hósdagin fekk Rannvá Andreasen, sum í fleiri ár hevur verið týdningarmiklasti spælarin hjá KÍ og kanska besti kvinnuligi fótbóltsspælarin í Føroyum yvirhøvur, tvey gul kort og harvið reytt kort. Tí er hon leikbannað í síðsta dystinum.

## Dystaryvirlit:

**Formuladeildin:**
**Leygardagin 13/8:**

| | | |
|---|---|---|
| 15:00 | TB-KÍ | Petur Reinert |
| 15:00 | GÍ-VB | Dagfinn Olsen |
| 16:00 | NSÍ-HB | Tony Asumaa |
| 18:00 | EB/Streymur-ÍF | Jens P. Brattalíð |

**Sunnudagin 14/8:**

| | | |
|---|---|---|
| 15:00 | Skála-B36 | Páll Augustinussen |

**2. deild:**
**Leygardagin 13/8:**

| | |
|---|---|
| HB-GÍ | Georg Rasmussen |
| Sumba-LÍF | Ransin Djurhuus |
| B71-AB | Jón K. í Brekkuni |
| FSV2004-Royn | Birgir Sondum |
| B68-B36 | Lassin Isaksen |

# Keflavík hevur framvegis møguleika

**Í Íslandi iðra teir seg um, at tað ikki eydnaðist at fáa týdningarmikla útivallar málið, sum var heilt tætt við, tá ið bólturin brast í stólpan**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Einasti føroyingurin, sum - burtursæð frá teimum í B36 - var við í UEFA Cup hóskvøldið, var Símun Samuelsen. Hann og liðfelagarnir í Keflavík vóru í Frankfurt, har teir spældu móti Mainz úr superliguni. Símun Samuelsen var frá byrjan ytstur á miðvøllinum í vinstru hjá Keflavík.

Heimaliðið hevði leingi stórt trýst á Keflavík málið, og heimaliðið vann2-0. Málini skoraðu teir eftir tíggju minuttir, og tá ið tað restaðu nítjan minuttir. Seinna málið var brotsspark, sum Keflavík hópurin var alt annað enn nøgdur við.

Keflavík málverjin stóð seg ógvuliga væl. Keflavík hevði ikki nógvar møguleikar, men miðskeiðis í 2. hálvleiki var um reppið, at teir fingu týdningarmikla málið á útivølli. Suðmundur Steinarsson smekkaði til úr 21 metrum. Bólturin tók í ein verjuspælara og snýtti málverjan, sum kortini fekk bent sær á og sligið bóltin á stólpan.

Venjarin hjá Keflavík, Kristjan Guðmundsson, heldur ikki, at uppgávan er vónleys undan heimadystinum.

- Um tað beinanvegin eydnast okkum at skjóta mál, so verður púra opið. Men tað er alneyðugt, at mótstøðuliðið ikki fær mál, sigur hann.

Sunnudagin skal Keflavík spæla á útivølli móti Vali. KR og Røgvi Jacobsen skulu sunnukvøldið spæla á heimavølli móti ÍBV, sum B36 á Ólavsøku sendi úr UEFA Cup kappingini.